HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

**Yvirlitstroling eftir makreli fyri Havstovuna 6.-25. juli 2014**

Í sambandi við yvirlitstroling eftir makreli í summar, søkir Havstovan eftir nótaskipi at gera royndirnar. Kanningin verður fíggjað við granskingarkvotu. Upp til 3.500 tons av makreli og upp til 500 tons av norðhavssild er ætlað at fíggja yvirlitstrolingina. Kvoturnar kunnu fiskast í føroyskum ella altjóða sjógvi, og verða lætnar sum eginkvotur. Tíðarskeiðið og krøvini, ið skipið skal lúka, eru lýst niðanfyri.

**Freistin at svara er mánadagin 23. juni 2014 við telduposti til HAV@HAV.FO**

Tað ella tey reiðarí (skip), ið lúka krøvini, verða biðin um at geva boð uppá, hvussu stóran (ella rættari sagt lítlan) part av kvotunum omanfyri, tey kunnu gera ætlaðu kanningarnar fyri. Tikið verður av nøktandi tilboði.

**Tíðarskeið**:
Yvirlitstrolingin verður í tíðarskeiðinum 6. til 25. juli 2013. Henda kanningin verður gjørd sum ein felags kanning eftir sama leisti sum í fjør, har Føroyar, Ísland og Noreg luttaka.

**Krøv til skipið í sambandi við kanningina:**

- Ekkólodd: Simrad EK(ER) 60 kHz lodd við bæði 38 og 200 kHz splitbeam botnum.
- Skipið skal hava tóvmegi til at tóva við flótitroli (Vónin 832 m) í vatnskorpuni við upp til 5 míla ferð. Reiðskapur: Eitt (Vónin 832 m MULTPELT) flótitrol við tilhoyrandi útgerð. Lemmar: Injector F-15, 6 $m^2$, 2000 kg.
- Trolveirur: Skipið skal hava flótiveir (Dynema ella líknandi, í minsta lagi 500 m), av tí at tóvað verður í vatnskorpuni.
- Skipið skal hava Scanmar ella Marport dekkseind og sensorar, ið skulu brúkast til at máta ymsar parametrar á trolinum/lemmunum.
- Skipið skal hava koyggjupláss til fimm fólk frá Havstovuni.
- Kanningarumhvørvið umborð: Tað skal vera gjørligt at standa innandura og taka prøvar av veiðuni. Her skal borðpláss (minst 100x60 mm) vera til mátibretti og elektroniska vekt.
- Internetsamband skal vera umborð, og ein LAN skipan. Skip, sum hava vælútbygt LAN v/interneti, hava fyrimun (EK60 teldan og arbeiðsteldurnar skulu hava samband við netið umborð).
- Á brúnni skal verða arbeiðspláss til tveir granskarar at sita við skriviborð at viðgera tølini frá ekkóloddunum.

**Útreiðslur í sambandi við kanningina:**
Í sambandi við yvirlitstrolingar í summar, kann roknast við útreiðslum á umleið kr. 600.000, ið skulu fíggjast yvir kvoturnar, t.e. í sáttmálanum millum Havstovuna og tann, ið tekur av. Útreiðslurnar í sambandi við túrin fevna millum annað um ymsa útgerð til túrin, løn og siglipening til fólkini umborð, tekniska útgerð til ekkómátingar, ljósmátara og til fyrireiking og at arbeiða upp prøvar, tiknir umborð.

Umsóknin skal sendast til :
Havstovan (hav@hav.fo)
Nótatún 1
100 Tórhavn
**Att: Erling í Liða**